DAGSINS MEINING

Ábyrgd landstýrismanna

Vit síggja dag og dagliga, hvussu mytur verða dyrkaðar. Tjóðveldisflokkurin hevur fostrað mytuna um danskan rentuvinning av kreppulánum til Føroya Landstýri. Tað tykist sum um, at hesir menn purra uppundir ein og hvønn illgruna teir síggja, soleiðis at als einki álit má vera millum donsku stjórnina og føroyingar. Bara Tjóðveldisflokkurin vinnur uppá at súrga viðurskiftini millum Føroyar og Danmark mest møguligt, og er hetta málið eitt gott dømi um, hvussu teir ábyrgdarleyst nýta eitthvørt høvi at gera hetta.

Tá Varaløgmaður og Fíggjarmálaráðharrin siga av løgtingsins røðarapalli, at danska stjórnin hevur havt rentuvinning av kreppulánum til Føroya Landstýri, so má man ganga út frá, at hesir menn hava grein í sínum máli. Tí var tað rættiliga skelkandi at hoyra aftursvarið, ið ríkisumboðið gav Lisbeth Petersen, tá hon spurdi, um hettar var rætt. Varaløgmaður og Landstýrismaðurin í Fíggjarmálum søgdu ósatt sambært hesum aftursvari.

Fjølmiðlar og onnur vóru sera gramm, tá ein annar landstýrismaður í hesum valskeiðnum segði skeivt um krabbameinsviðgerð. Hvat er øðrvísi við hesum? Eigur man ikki at krevja av landsstýrismonnum Tjóðveldisfloksins, ið sjálvir sita undir hvørjum orði hjá øðrum, at teir siga sannleikan av Løgtingsins røðarapalli? Er tað ikki sera álvarsamt, tá formaður Sambandsfloksins sigur, at hesir menn hava sagt ósatt?

Man hoyrir ikki eitt orð um umbering frá nøkrum av hesum monnum, hóast teir hava fingið at vita um svarið frá Ríkisumboðnum. Ætlar Tjóðveldisflokkurin at halda fast um mytuna um danskan rentuvinning?

Løgmaður hevur eina sera stóra ábyrgd í hesum máli. Hvørjar avleiðingar slíkt eigur at fáa er ringt at meta um, men eina ábreiðslu ella "nøs", sum tað verður nevnt aðra staðni, hevði í minsta lagi verið uppá sítt pláss.

Tað mest skelkandi við hesum døminum um ábyrgdarleysa umsleinging við orðum er, at um eingin spurdi ríkisumboðið, so slapp mytan um danskan rentuvinning at standa ósvarað og hevði livað væl enn. Væl at merkja um hon ikki enn ger tað, tí tað verður ikki sjónligt fyri borgaran, hvussu álvarsligt hetta mál er, uttan so at Løgmaður ger tað, sum løgmaður eigur at gera í einum slíkum føri. Nevniliga at seta landstýrismenninar, ið eiga orðini uppá pláss. Landstýrismenn skulu borðreiða við sannleikanum og ikki við politiskt litaðum gitingum fyri at øsa veljaran og geva sær sjálvum politiskan vinning.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eg meini tað!

– Ein tosar fullveldi innan ríkisfelagsskapin, ein annar tosar um ríkisfelagsskapsskipan (samveldi) við Danmark, eg meini tað…

Johan Dahl

Havi just siti og lisið tvær sera áhugaverdar greinar í Sosialinum, onnur er samtal við fyrrverandi borgarstjóran í Havn, og hin er ein grein hjá Bjarna Djurholm, vinnumálaráðharra.

Undirritaði vil heita á øll fullveldisáhugað um at lesa hesar greinar, tí tær eru absolut áhugaverdar

Tær sær ikki út til fyri mær, sum um tað er gingið upp fyri, hvørki Poul Michelsen ella Bjarna Djurholm, at tað síðan 1948, tá heimastýrislógin kom í gildi, hevur verið og framvegis er møguligt hjá okkum føroyingum at yvirtaka flestøll málsøki og harvið eisini gjald av teimum yvirtiknu málsøkinum, og forhandlast kann framvegis um B-málini.

Vit í Sambandsflokkinum hava altíð roynt at finna loysnir sum tæna fólkinum og landinum best, og vit hava eisini hesi seinastu fýra árini roynt at víst tykkum fullveldismonnum á loysnina við nýskipanaruppskoti okkara – lesið tað – tað er slettis ikki av leið, skal eg siga tykkum.

Tá ið tosað verður um peruvelling av Pouli, so má eg siga tað, at tann størsti peruvellingur, sum eg síggi í føroyskum politikki ídag, hann finnst nevniliga eitt stað – í Fólkaflokkinum. Onkur tosar um at fáa studning aftur til vinnuna, onkur tosar um slettis ongan studning at hava, nakrir tosa um fullveldi, og nú tosa tit so sanniliga eisini um fremja nýskipanaruppskot Sambandsfloksins í verki, og tað taki eg sjálvandi hattin av fyri tykkum fyri.

Tá eg hoyri orðið fullveldi nevnt av Poul, so má ein ganga út frá, at tað er eftir leistinum í samgongukskjali tykkara – nevniliga fullur suverenitetur eins og Tjóveldisflokkurin vil hava hann ella hvussu??

Poul – tá tú tosar um fullveldi innan fyri ríkið eisini kann verða áhugavert, so haldi eg, at tú má geva okkum, sum enn ikki hava sæð ljósið, eina eitt sindur gjøllari frágreiðing.

Viðvíkjani tí vinnuliga dynamikkinum, sum tú her tosar um, so haldi eg meg hava hoyrt aðrastaðni frá í samgonguni, at hesin netupp ikki er at finna innan ríkisfelagskapin, men fyrst skal "koma fram í vinnulívsmonnunum", tá loysingin er framd, so nú haldi eg, at tað sum vendir niður vendir upp hjá tykkum, enn einaferð.

Tá vit koma til blokkin (stuðulin sum tú kallar hann) úr Danmark, sum tú vil hava har pipari grør, so haldi eg, at tað er hóskandi at spyja, hví hava tit so ikki skert hann beinanvegin tit komu framat í 1998??? Tit hava so sanniliga havt møguleikan saman við tykkara fullveldispartnarum, men ístaðin hava tit verið sera grammir og hækka hann við 107 mio um árið, men nú tit hava ásannað, at tit eru kollsigldir í fullveldisætlan tykkra, ja nú byrja tit so at skerja við heilum 356 mio. + uml. 30-50 mio afturat fyri onnur yvirtikin málsøki, sum eisini nú skulu gjaldast herfrá.

Eg haldi, tað melir ríkiliga illa fyri tykkum, nú tit hava gingið í klingur í 4 ár, ikki tí eg skilji væl, at tit hvørki vita út ella inn og hava ilt við at definera, hvat fullveldið stendur fyri, og hvat samband stendur fyri, men vónandi finna tit útav tí áðrenn valið.

Hvat viðvíkur sameinigheitini millum tað at verða sambandsmaður og vinnulívsmaður, so haldi eg, at tað varð betur ósagt, tí har skuldi fyrrv. borgarstjórin vitað betur.

Eg vóni eisini, at Føroya fólk ger sína stoðu upp til hetta løgtingsvalið og stendur saman um tann flokkin, sum setir fólkið fremst og verjir framtíð Føroya sum vælferðarsamfelag – innan ríkisfelagsskapin, nevniliga Sambandsflokkin.

Ávaring

Elsa Blicher Christiansen
Skopun

Nú tað stundar til valið, vil eg geva Føroya fólki eina ávaring.

Einki val hevur verið so álvarsamt sum júst hetta. Fyrr galt tað bara um at vit skuldu hoyra undir Danmark ella ikki.

Eg havi altíð valt samband, men tann dag Danmark fór inn í ES, tá kúvendi eg, tí eg var klár yvir, at nú fóru teir ikki at gevast, fyrr enn teir høvdu fingið okkum inn í ES eisini.

Tann, ið lesur Bibliuna, sær, at Antikrist kemur frá ES. Tað stendur fleiri staðni í Bibliuni um Antikrist. Lesið til dømis Dánjal kap. 7.

Hann, ið tískil velur menn, sum vilja inn í ES, hann er við til at fara í kríggj móti teimum heilagu og móti Ísrael, Guds fólki.

Øll, ið lesa Bibliuna, vita, at Antikrist kemur frá Satan. Eg velji fyrr alt annað, enn at selja mína sál til Satan.

Varið tykkum eisini fyri teimum, sum misbrúka Guds navn. Tað er bert fjórða hvørt ár, at teir minnast til, at Gud er til. Hansara navn er alt ov dýrabart at brúka til valagn.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Far heim og skriva umaftur, Sjúrður!

Um oddagreinin í Fregnum 14. februar 2002 var ein stílur, hevði Sjúrður Skaale fingið hana aftur í høvdið við boðunum. Skrivað umaftur! Vánaligt avrik! Hugsa, áðrenn tú skrivar

Elsa Birgitta P. Petersen
formaður Føroya Lærarafelags

Sjúrður Skaale skrivar, at okkurt má gerast fyri at fáa lív í tann stagneraða fólkaskúlan.

At fólkaskúlanum tørvar avbjóðing.

At fólkaskúlin er skyld í, at støðið í øllum landsins hægri skúlum lækkar.

At tá tað kemur til tann bókliga kunnleikan er tað vorðið til eitt mantra (í fólkaskúlanum), at ongi krøv skulu setast.

At fólkaskúlin ikki kveikir forvitni, áhuga og eldhuga.

At fólkaskúlin køvir neistan hjá teimum hugaðu næmingunum.

At tað er langt síðani, at Føroya Lærarafelag kom við nøkrum góðum hugskotum um góðan skúlaskap.

At fólkaskúlanum vantar eldhugaðar og visionerar lærarar.

At tann føroyski fólkaskúlalærarin svevur.

Tí mugu politisk stig takast til at fáa eina føroyska frískúlalóg setta í verk við støði í álitinum um frískúlar.

Sjúrður Skaale heldur, at við eini frískúlalóg kann tann føroyski fólkaskúlin fáa nýggj hugskot, nýggjan íblástur og nýtt lív.

Góði Sjúrður. Skalt tú skriva um skúla, mást tú hava skil fyri skúlaskapi. Tú mást vita nakað um tann skúlaskap, tú viðger. Tað er ikki bara nokk at hava gingið í skúla fyri 15-20 árum síðani, tí tá endurgevur tú bara tína egnu skúlagongd. Tær frustrationirnar, ið tykjast at plága teg, boða ikki frá góðum. Men sum eitt vaksið fólk átti tú at hugsað, at tað eru kanska ikki bara skúlin og lærarin, sum eru atvoldin til hesa.

Tú eigur heldur ikki at skriva um skúlaskap í eini oddagrein út frá nøkrum einoygdum sjónarmiðum frá onkrari hissini ivasamari keldu.

Í greinini nýtir Sjúrður Skaale høvi til at traðka á føroyskar fólkaskúlalærarar. Fólkaskúlalærarar, sum eru koyrdir í senk av stórum krøvum og væntandi vilja hjá teimum myndugleikum, sum uttan at vita, hvat tað innibar, hava sett hesi stóru krøv.

Henda hetz skal helst brúkast til at fáa pengarnar at passa. Eg síggi ein goymdan dagsordan í hesi